tíðindablaðið
sosialurin
Telefon 1 18 20
Argjavegur 26, 3800 Argir
Postsmoga 76, 3800 Tórshavn

Útgevari: P/f Sosialurin ©
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Blaðfólk: Høgni Djurhuus
Randi Jacobsen
Tórfinn Smith
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Ungdómur og russarahatur

TAÐ hevur verið vanligur siður — í málgagni fólkafloksins — í nógv ár at spýggja gor og gall niður yvir alt, sum er russiskt. Endamálið er miðvíst at birta upp undir og nøra um russarahaturið millum vanliga føroyingin fyri harvið at fáa hann at tekkjast tí føroyska fólkaflokkinum.

HÓAST hetta er vanligur kostur í Dagblaðnum, og tí einki nýtt, so bar kortini av seinasta mánadag tá eingin minni enn oddamaðurin fyri allan fólkafloksungdóm í landinum trívur eftir rifluni og hóttir við at skjóta russar. Í einum lesarabrævi undir heitinum »Russaraóskil í Vági« skrivar Erhard, sum vit gita er tann sami Erhard, ið aðrastaðni í sama blaði hálovar royndunum at stovnseta fólkafloks ungmannafeløg kring landið, um eina hending honum var fyri í Vági, har russar skulu hava sprænt máling niður yvir fleiri bilar, meðan arbeitt varð uppi í mastrini á einum skipi.

VIT loyva okkum her at prenta eitt brot úr umrødda brævi . Erhard skrivar: »Eg var so flintrandi óður um hesa ógerð, at um eg hevði eina riflu í bilinum, hevði eg skotið báðar tveir niður við brestin. Men lukkutíð var eg ikki vápnaður (tað var jú 1. páskadagur). Hesi krapylini, ið koma hendavegin fyri at fáa skip teirra umvæld, respektera hvørki Gud ella hin Ónda . . .«

HÓAST flestu føroyingar hvørki taka undir við amerikanska stuðlinum til uppreistrarherarnar í Miðamerika ella russisku uppílegginini í Afghanistan, so merkir hetta ikki, at vit bera hatur til alt, ið er amerikanskt ella russiskt. Men her er so fólkaflokkurin við málgagni sínum og nýggju fólkafloksungmannafeløgunum eitt undantak. Hesi royna miðvíst at sáa hatur til eitt heilt fólk við at uppgeila føroyingin til at venda hesum fólki baki.

SØGAN minnir okkum eisini á hetta fyribrigdi ferð eftir ferð. Og at tað eisini er so stutt millum ætlan og gerð. Vit minnast, hvussu roynt varð at íbirta hatur móti russum, tá Danmark varð hersett av týskinum fyri á tann hátt at fáa ungar danir at melda seg inn í Frikorps Danmark og síðani fara til eysturfrontin at berjast ímóti russinum saman við týskinum. Tá hesir komu heim aftur vóru teir ringastu bølmenni og royndu at basa fyri øllum tí, sum bara minti um Russland og russar.

VIT minnast úr okkara egnu søgu, hvussu tað gekk við tiltakinum hjá gøtumonnum á sinni at geva út eitt losjublað. Tað endaði við miðvísum russarahatri og ein teirra, ið stóð á odda fyri tí blaðnum er nú millum oddafiskarnar hjá ungmannafelagnum hjá fólkaflokkinum ı Eysturoynni.

OG NÚ uppliva vit so aftur somu eggjan til russarahatur, og hesaferð er tað so sjálvur ovastin fyri allan fólkafloksungdóm í landinum, ið hóttir við at brúka riflu ímóti russiskum fiskimonnum. Er tað hesin ungdómur, ið skal taka við um nøkur ár, so er lítið at ivast í, at stavnamaðurin fær nógvar trúgvar viðhaldsmenn.

VIÐ umrøddu greinini og øðrum við er vanligi føroyski borgarin vitni til, at tann spíri, sum stavnamaðurin hevur lagt til hatur ímóti øllum russum, er við at bera ávøkstur og at enda í fullum blóma gerst sjálvt tilverugrundarlagið hjá fólkaflokkinum. Verður henda miðvísa haturskampanja at halda fram og nørast tá kann stavnamaðurin, ið helst er ein tann mest høgravendi politikarin, ið hevur livað í hesi øldini, fegnast um, at innblásturin frá fyrstan tíð kom frá júst hansara penni og munni.

VIT ávara ungdóm okkara, so skammleyst og so ókritiskt at lata seg blinda av stavnamanni fólkafloksins.

jamü



Russaraóskil í Vági

Seinnapartin 1. páskadag setti eg meg glaður í mín annars óvaskaða Ford Savoy 1.6 í Vági og ætlaði mær at fara ein hart tiltrongdan avslappingartúr. Nývaknaður, sum eg var, legði eg ikki beinanvegin til merkis, at bilurin nú brádliga var vorðin flekkutur. Eg trúði sjálvandi ikki mínum egnu eygum og gníggjaði tey væl og virðiliga fyri at fáa hesa undarligu sjón burtur, men pílar í skot, at var bilurin líka flekkutur, tá eg læt eyguni sundur aftur.

Eg sprakk út úr bilinum og fór so at kanna rættiliga eftir. Jú, mín sann. Bilurin var, allur sum hann var, yvirsproytaður við gulari málin. Í mínum stilla sinni hugsaði eg, hvar sørin hetta var komið frá.

Nú er mær hyggjandi aftur um bak og oman á skipasmiðjuna, og tá mundi eg svíma uppeftir. Ti dekan fari, um ikki tveir russarar hingu sum turrir hávar uppi í mastrunum og sproytaðu mastrarnar gular.

Eg varð so flintrandi óður um hesa ógerð, at um eg hevði eina riflu í bilinum, hevði eg skotið báðar tveir niður við brestin. Men lukkutíð fyri teir var eg ikki vápnaður (tað var jú 1. páskadagur).

Hesi krapylini, ið koma hendavegin fyri at fáa skip teirra umvæld, respektera hvørki Gud ella hin Ónda. Teir uppføra seg, sum um teir eiga alla bygdina. Teir høvdu fingið boð frá politivaldinum sama dagin um ikki at gera nakað arbeiði um páskirnar, men tað løgdu teir ein lort í.

Í mínari vreiði varð mær hyggjandi yvir á ein annan bil, ið stóð tætt hjá, og eg sá, at hann hevði fingið sama lit sum mín. So tað var ikki bara mín, ið hevði skift lit henda dagin.

Tá ið eg so meldaði skaðan til tryggingina aftan á páskir, fekk eg sum vátan vøttin, tí teir tóku ikki við. Tað var nevniliga ikki fyrstu ferð, at óskil hevði vakdað. Einaferð fyrr vóru um 30 bilar oyðilagdir av sproyting á Vágs skipasmiðju.

tjak og meiningar

Mamma, hevur tú pengar til dans?

Atgongumerkini til dansin eru alt ov dýr. Neyvan er stuttleikaskatturin avtikin, áðrenn prísirnir hækka. Um tað er so dýrt at hava dans, má okkurt gerast. Tað verður sagt, at tollurin á ljóðførum hevur tann avgerandi leiklutin. Um tað er satt, áttu politikararnir at lækkað tollin á ljóðførum. Tí tað kann ikki vera rætt, at vit, ið lítið og einki vinna av peningi, skulu líða undir hasi ólukku tollskipanini. Hesir pengar kundu lætt verið vunnir á annan hátt. Kanska við at hækka tollin á øðrum vørum, ið ikki ávíst verða nýttar av ungdómi.

Men valsaktans er tað ikki bara tollurin, ið er avgerandi. Plátuvendarum nýtist ikki ljóðfør, og í Havnini eru plátuvendarar mest vanligir í dansihølunum. Hóast alt er prísurin 60 kr.

Einhvør kann gera sína egnu meting um, hvar tað stóra yvirskotið fer. Stúgvandi fult av fólki, ið øll gjalda høgan prís, bæði fyri atgongumerkini og so fyri vørurnar, ið seldar verða inni.

Mamma per átti ein kassa av appelsinum. hon segði, at Per kundi taka 4 og geva beiggja sínum helvtina. Men tá Per sá allar appelsinurnar, hugsaði hann, at nógv er til so 8 mundu ikki bila. Per er klókur, so hann gav beiggja sínum 2 smáar.

16 ár — uttan pengar.

Eitt farvæl til felagið í Eysturoy!

Ein tøkk fyri tíðina, vit vóru í sama flokki, við ynski um, at tit roynast tykkara nýggja »flokki« trúgvari, enn tí gamla.

Takk fyri, at tit hava sagt okkara flokki farvæl, tí, sambært lógum floksins høvdu tit ongan rætt at verða verandi í okkara flokki aftaná, at tit hava stovnað nýggjan flokk.

Vónandi eru tit so ærlig, at tit lata teimum, sum hava hug framvegis at vera í okkara flokki, tær bøkur og skjøl, sum flokkurin eigur, íroknað tær bøkur, skjøl og myndir, sum Adolf Hansen hevur »lænt« úr floksrúminum á gamla apotekinum.

NB. Okkara skrivari í Suðurstreymoy, hevur latið okkum fundarbókina og skrivliga meldað seg út, og ein afturat. Har var slætt borð.

Christian Holm Jacobsen, formaður
Inger á Argjagarði, næstformaður
Álvur Kirke, kassameistari
Juul Jacobsen, tiltakslimur
Mortan á Geil, tiltakslimur

Advarsel til Færøerne

Jørgen Tobies, mannarættindatalsmaður um »forslag til lov om patientforsikring.

Folketinget 1. behandlede i sidste måned »forslag til lov om patientforsikring«. Ifølge forslaget kommer loven ikke umiddelbart til at gælde for Færøerne. Dette er så absolut til Færøernes fordel hvis loven vedtages som foreslået.

Indenrigsministeren siger direkte »psykiske skader er undtaget fra dækningsområdet«. Forslaget siger også »erstatning efter denn lov ydes ikke for skader, der skyldes egenskaber ved de lægemidler, der er anvendt ved undersøgelse, behandling eller lignende«.

Hermed er der lagt op til ubehageligheder og endnu en forskelsbehandling for både tidligere og nuværende psykiatriske patienter.

I forslaget udelukkes nemlig dels de der indtager nervemedicin (og der er statistisk 22% av Danmarks befolkning der dagligt indtager en fuld dosis af denne medicingruppe, som ofta har psykiske skader i kølvandet). Man udelukker også alle de patienter der modtager elektrochok — en brutal behandling der medfører både hukommelsestab og hjerneskader.

Gennem mit arbejde i Medborgernes Menneskerettigheds Kommission er jeg i kontakt med en del af disse patienter og jeg er slet ikke i tvivl om den menneskelige pris de har betalt. At menneskelige tragedier ikke kan gøres op i penge er forståeligt nok, men at de helt skal udelades fra en kommende erstatningslovgivning er urimeligt.

Når dette er sagt skal det også med, at lovforslaget har det positive, at den patientforsikringsordning der foreslås oprettet til at behandle klagesagerne, ifølge indenrigsministeren tilstræbes at være uafhængig af sundhedsstyrelsen, der af patienterne ofte betragtes som en institution der udelukkende varetager og plejer lægernes interesser.

Dette kan dog slet ikke opveje den ovenfor nævnte forskelsbehandling af de psykiatriske patienter. Færøerne bør være opmærksomme på denne lov og sørge for, at den ikke kommer til at gælde for Færøerne, som foreslået, men derimod kommer til at omfatte **alle** patientgrupper og **alle** former for skader (også dem forårsaget af medicin).

Med venlig hilsen

Jørgen Tobies, talsmand
Medborgernes Menneskerettigheds Kommision
Haraldsgade 77
2100 København Ø